LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 001/2024 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Bárði á Steig Nielsen, løgtingsmanni, um miðfyrisitingina**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvør er árligi kostnaðurin av aðalráðunum árini 2019 – 2023?

**Svar:**

Sum spyrjarin vísir á, er hesin fyrispurningurin uppfylging uppá spurning 52-133/2023, tá eg í svarinum vísti á gongdina í ársverkum. Hetta gjørdi eg, tí eg haldi at ársverk er rættasti mátin at vísa á, hvørt miðfyrisitingin er vaksin ella ikki, tí ársverkini ikki eru ávirkaði av lønarvøkstri ella prísvøkstri. Lønar- og prísvøksturin er ymiskur frá ár til ár. Serliga í 2023 vóru lønarhækkingarnar høgar.

Ársverkini í miðfyrisitingini 2019 – 2023 og býtt út á høvuðskontur í løgtingsfíggjarlógini eru:

| Høvuðskonta | Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11102 | Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | 21,15 | 21,12 | 17,62 | 17,18 | 10,69 |
| 11103 | Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | 14,33 | 16,88 | 16,41 | 17,3 | 14,49 |
| 11105 | Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (Rakstrarj.) | 16,39 | 16,15 | 15,87 | 15,32 | 16,85 |
| 11106 | Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Rakstrarj.) | 0 | 17,18 | 19,43 | 18,64 | 21,72 |
| 11109 | Barna- og útbúgvingarmálaráðið (Rakstrarj.) | 24,04 | 25,57 | 27,12 | 27,28 | 12,99 |
| 23102 | Undirkonto 20 Undirvísingarstýrið í 2020 | -11,09 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 11124 | Heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | 19,29 | 16,26 | 16,25 | 16,46 | 16,76 |
| 11126 | Almanna- og mentamálaráðið (Rakstrarj.) | 15,69 | 16,36 | 15,06 | 16,18 | 16,31 |
| 11128 | Løgmálaráðið (Rakstrarj.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 8,18 |
| 11159 | Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Rakstrarj.) | 21,15 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 11160 | Samferðslumálaráðið (Rakstrarj.) | 6,43 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 11165 | Umhvørvismálaráðið (Rakstrarj.) | 0,28 | 0 | 0 | 0 | 9,6 |
| | **Tilsamans (ársverk)** | **127,66** | **129,52** | **127,76** | **128,36** | **127,56** |

Kelda: Løndátavøruhúsið – bókingardagfesting.
Viðm. Leigunevndin lá undir høvuðskonto 11126 til 2022, tá hon varð flutt til høvuðskonto 11165. Í Løndátavøruhúsinum eru 0,28 ársverk feilskrásett undir 11165 í 2019, sum eiga vera undir 11126.

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Sum sæst í talvuni omanfyri, er miðfyrisitingin hvørki vaksin ella minkað í tíðarskeiðinum 2019 – 2023.

Um vit skulu hyggja at kostnaðinum, er neyðugt at taka hædd fyri lønarvøkstrinum, av tí at lønarútreiðslurnar eru góðar 75% av samlaðu útreiðslunum til miðfyrisitingina.

Lønarútreiðslurnar hjá aðalráðunum 2019 – 2023 eru hesar:

| Høvuðskonta | Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11102 | Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | 11.962 | 12.398 | 11.584 | 11.410 | 7.678 |
| 11103 | Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | 9.718 | 11.533 | 11.791 | 12.223 | 10.409 |
| 11105 | Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (Rakstrarj.) | 10.610 | 10.786 | 10.543 | 10.240 | 11.862 |
| 11106 | Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Rakstrarj.) | 0 | 11.245 | 12.089 | 12.747 | 15.608 |
| 11109 | Barna- og útbúgvingarmálaráðið (Rakstrarj.) | 14.845 | 16.595 | 18.094 | 18.799 | 8.669 |
| 23102 | Undirkonto 20 Undirvísingarstýrið í 2020 | -6.910 | | | | |
| 11124 | Heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | 10.816 | 9.043 | 9.442 | 9.700 | 10.373 |
| 11126 | Almanna- og mentamálaráðið (Rakstrarj.) | 9.541 | 9.961 | 9.911 | 10.492 | 11.366 |
| 11128 | Løgmálaráðið (Rakstrarj.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.513 |
| 11159 | Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Rakstrarj.) | 13.799 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 11160 | Samferðslumálaráðið (Rakstrarj.) | 3.669 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 11165 | Umhvørvismálaráðið (Rakstrarj.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 7.009 |
| | **Tilsamans (tús. kr.)** | **78.050** | **81.561** | **83.454** | **85.611** | **88.487** |

Kelda: Búskaparskipan Landsins.

Samlaði vøksturin árini 2019 – 2023, tá einans verður hugt eftir lønarútreiðslum er 13,4%, sum svarar væl við vøksturin í sáttmálaásettu lønunum. Eitt nú er lønin eftir sáttmálanum hjá Akademikarafelagnum vaksin 13,2% sama tíðarskeiði.

Um hugt verður eftir samlaða kostnaðinum av aðalráðunum 2019 – 2023, er kostnaðurin hesin:

| Høvuðskonta | Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11102 | Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | 14.945 | 15.053 | 15.552 | 15.239 | 12.099 |
| 11103 | Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | 11.880 | 13.598 | 14.628 | 14.301 | 12.115 |
| 11105 | Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (Rakstrarj.) | 16.004 | 14.645 | 14.188 | 14.255 | 17.528 |
| 11106 | Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Rakstrarj.)*** | 19.126 | 14.412 | 14.585 | 15.001 | 19.914 |
| 11109 | Barna- og útbúgvingarmálaráðið (Rakstrarj.)* | 19.015 | 23.867 | 24.352 | 25.441 | 12.086 |
| | Undirvísingarstýrið (høvuðskonta 23.1.02) undirkonto 20 tikin úr** | -9.413 | | | | |
| 11124 | Heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | 13.510 | 11.236 | 11.406 | 12.372 | 12.731 |
| 11126 | Almanna- og mentamálaráðið (Rakstrarj.) | 13.566 | 14.223 | 13.589 | 14.380 | 15.808 |
| 11128 | Løgmálaráðið (Rakstrarj.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 7.157 |
| 11160 | Samferðslumálaráðið (Rakstrarj.) | 4.684 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 11165 | Umhvørvismálaráðið (Rakstrarj.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 8.478 |
| | **Tilsamans (tús. kr.)** | **103.317** | **107.034** | **108.300** | **110.989** | **117.916** |

* Yrkisdepilin tikin úr.

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

** Játtan til undirkonto í 2020 er brúkt at trekkja úr í 2019.
*** Høvuðskonto 11.1.59 flutt til 11.1.06 Uttanríkis- og vinnumálaráðið.
Kelda: Búskaparskipan Landsins.

Hetta svarar til ein samlaðan vøkstur árini 2019 – 2023 á 14,1%, sum er eitt sindur meira enn vøksturin í lønarútreiðslum. Her skal havast í huga, at prísvøksturin sama tíðarskeiði hevur verið 17,7%.

At enda vil eg vísa á, at útreiðslurnar til miðfyrisitingina eru minkandi í mun til samlaðu rakstrarútreiðslur landskassan. Í 2019 var kostnaðurin av miðfyrisitingini 2,08% av samlaðu rakstrarútreiðslum landskassans, og í 2023 var kostnaðurin av miðfyrisitingini minkaður til 1,86% av samlaðu rakstrarútreiðslum landskassans.

Í Tinganesi, 22. august 2024

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo